# Krisjan Sune setti føroyamet

**Hóast tað hevur gingið illa í hond hjá trýfalt føroyameistaraliðnum í billard úr Klaksvík nakrar dystir, so tók oddaspælarin hjá liðnum øll á bóli, tá hann á heimaborði í Klaksvík móti Kagganum 2 skoraði besta umfarið, sum nakrantíð er gjørt í føroyskum billardspæli, heili 324 eygu**



*Krisjan Sune Høgnesen vísti leygardagin, hvør veruligur dugur er í honum sum ein av okkara fremstu billardspælarum. Hann gjørdi Føroyamet í einum umfari, nevniliga 324 eygu*

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Støðan í liðkappingini í billard gerst alsamt meira spent. Klaksvíkar Billardfelag, sum hevur vunnið FM-heitið seinastu trý árini, dragnar longur afturút, nú tað líður móti endanum. Hóast felagið megnaði at vinna 12-6 móti Kagganum 2 leygardagin, so kann tað gerast sera tungt at fáa øll tey neyðugu stigini til tess at røkka FM-trúnuni fyri fjórðu ferð á rað. Kaggin 1 og Havnar Klubbi hava nevniliga tikið dik á seg og liggja sera væl fyri nú í endaspurtinum.

Eftir fleiri tap gekst leygardagin tó betur hjá klaksvíkingum, tá teir fingu vitjan av Kagganum 2 og vunnu12-6. Krisjan Sune Høgnesen var komið aftur í "støðið" og skoraðum eitt spæl uppá nærum 1000 eygu og hevði nógv besta umfarið nakrantíð. Sonhard Johannesen hevði eisini ein góðan dag og vann allar sínar dystir. Verri gekst hjá Njál Petersen, sum enn ikki er komin rættiliga fyri seg. Hann tapti allar dystirnar.

Í dystinum í Klaksvík leygardagin eydnaðist tað Heimir Ottoson hjá Kagganum at taka fýra stig frá klaksvíkingum og Johannes Skaarup at taka tvey stig. Anfinnur Hansen hevði sín ringasta dag higartil í kappingini. Tapti allar dystirnar.

Annars var eingin ivi um, hvat var betra liðið í Klaksvíkar Klubba leygardagin, Krisjan Sune Høgnesen, sum hevur havt eina "downperiodu" tók dik á seg aftur og skoraði nærum 34 eygu í meðal. Eitt spæl var uppá 892 eygu og hevði hann eisini ta besta umfarið, sum nakrantíð er gjørt í Føroyum, nevniliga 324 eygu. Næstbestur í kappingini var Sonhard Johannesen, sum hevði góð 22 eygu í meðal.

Støðan í liðkappingini fyri meistaralið er nú tann, at Klaksvíkar Billardfelag og Kaggin 1 eru jøvn í stigum, 48 hvør, tó at klaksvíkingar hava spælt eitt umfar meira. Havnar Klubbi, sum eisini hevur eitt umfar minni enn klaksvíkingar, hevur 44 stig, og aftast er Kaggin 2 við 24 stigum.

Taka vit støðuna, so er greitt, at Kaggin 1 og Havnar Klubbi hava best møguleika fyri at gerast føroyameistari, tó at einki er endaliga avgjørt enn. Hóast Havnar Klubbi liggur fýra stig aftanfyri Kaggan 1, so hevur liðið tó tann fyrimun, at tað manglar eitt umfar móti veikasta liðnum Kagganum 2. Úrslitið av tí kappingini kann fáa stóran týdning fyri endaliga úrslitið. Tá hugsað verður um at Kaggin 1 skal til Klaksvíkar seinasta dystin at møta føroyameistarunum, so er greitt, at Havnar Klubbi er liðið, sum hevur bestu møguleikar at gerast føroyameistari. Men enn eru tvey umfør eftir og avgerandi er, hvussu Havnar Klubbi fer at klára seg ímóti Kagganum 1 komandi vikuskifti. Eftir ta uppgerðina er so bert eitt umfar eftir: Kaggin 2 móti Havnar Kluibba og Klaksvíkar Billardfelag móti Kagganum 1.

# Ægir Stevnan 2005

**Svimjikapping var um vikuskiftið 12 og 13 feb. í Klaksvík**

SVIMJING

Hetta var kapping fyri bólkarnar 4 og eldri, tað vil siga svimjarar frá 13ár og upp eftir.

32 kappingar vórðu svomnar og sigurharri aftur hesaferð gjørdist Fuglafjarðar Svimjifelag.

**Samlaða úrsliti gjørdist :**

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Nr. 1 Fuglafjarðar Svimjifelag | 21 | 7 | 6 |
| Nr. 2 Tvøroyrar Svimjifelag | 14 | 8 | 5 |
| Nr. 3 Ægir | 11 | 8 | 3 |
| Nr. 4 Havnar Svimjifelag | 5 | 3 | 10 |
| Nr. 5 Flot | 2 | 5 | 0 |
| Nr. 6 Skeggjar | 1 | 8 | 4 |
| Nr. 7 Vágs Svimjifelag | 1 | 6 | 5 |

Tvey nýggj føroysk met blivu sett í Klaksvík, tað eina setti Elspa Mørkøre úr FS í 200m rygg svimjing, tíðin var 2.26.73, hetta var eisini bólkamet í bólki 4.

Natalia Reinhardt setti nýtt føroyskt met í 200m firvalds svimjing við at svimja teinin við tíðini 2.30.01, hetta var eisini bólkamet. Somuleiðis var hetta so gott at Natalia svam undir kravtíðina til Oyggjaleikirnar í ár, og hon vann eisini tríggjar av kappingunum um vikuskiftið.

Pauli Øssursson Mohr úr FS svam so góða tíð í 50 m frí svimjing at hann vann silvurnálina, tíðin varð 0,58,60, Pauli vann eisini fýra av kappingunum í Klaksvík

Kristian Olsen úr Ægir sum eisini hevur svomið undir kravtíðina til Oyggjaleikirnar hevði eitt gott vikuskiftið, hann vann ikki minni enn átta kappingar.

Elspa Mørkøre úr FS hevur eisini svomið undir kravið til Oyggjaleikirnar, hevði eisini góðar dagar í Klaksvík, hon vann seks kappingar.

Aðrir svimjarar ið kunnu nevnast fyri gott avrik í Klaksvík eru: Shaila millum Garðarnar, Sára Ejdesgaard úr TS og Jákup Øssursson og Karina Petersen úr FS , hesi vunnu tríggjar kappingar í part.

Umleið 50 svimjarar vóru við í kappingini

Næsta svimjikapping verður í Vági leygardagin 19 februar, og er hetta fyri yngru bólkarnar.

# Veteranar hjálpa til

**Fyrrverandi meistarar í B68 skulu hjálpa Juliani Johnsson og hava ábyrgdina av ungdómsdeildini, sum toftamenn leggja nógv í at røkja væl**

B68
*Jóannes Hansen*

Julian Johnsson og hansara menn venja av lívsins kreftum fyri at vera so væl fyri, sum tað ber til, tá ið teir skulu fara undir setningin, sum á Svangaskarið í fyrsta lagi er at endurvinna plássið í bestu deildini, sum teir mistu í fjør, og sum í øðrum lagi ella rættari sagt eisini er at standa seg væl í steypakappingini. Í hesi seinnu kappingini verður avbjóðingin ivaleysa stór, tí í fyrsta umfarinum skal B68 norður á Mølina at takast við EB/Streym.

Síðani á nýggjárinum hevur verið møguleiki at vant á Svangaskarði, og síðani um mánaðarskiftið hava venjingarnar verið regluligar og undir leiðslu av nýggja venjaranum.

Sambært B68 heimasíðuni, b68.fo, er tað nú greitt, at tveir av fótbóltsveteranunum á Toftum skulu hjálpa Juliani Johnsson, sum umframt at standa fyri venjingini, eisini hevur álitispláss á miðvøllinum at hugsa um.

Aksel Højgaard er hjálparvenjari. Umframt at hava ábyrgdina av liðnum í 3. deild verður hann á beinkinum, tá ið liðið í 2. deild fer at spæla.

Ingolf Petersen hevur nú høvuðsábyrgdina av ungdómsdeildini hjá B68. Hann hevur tikið ábyrgdina eftir Jóhannus Danielsen, sum í løtuni ikki hevur stundir at taka sær av hesum. Í fyrraárið var Ingolf Petersen hjálparvenjari í 1. deild.

Felags fyri allar hesar tríggjar - Aksel Højgaard, Ingolf Petersen og Jóhannus Danielsen - er, at teir í síni tíð vóru trúgvir og drúgvir á besta liðnum, sum vann FM í 1984 og í 1985 og aftur í 1992. Jóhannus var verjuspælari, Ingolf var miðvallari, og Aksel var í álopinum.